Fólkaheilsuráðið

# Lívið í Føroyum er framúr

Ein kanning eftir leisti hjá OECD Better Life og Gallup World Poll

---



# Innihald

Hvussu er lívið? ... 3
Um kanningina ... 3
Háttalag ... 3
Høvuðsniðurstøður í frágreiðingini ... 5
Indikator 1: Býli ... 7
Indikator 2 Inntøkur ... 11
Indikator 3 Arbeiði ... 13
Indikator 4 Sosial netverk ... 16
Indikator 5 Útbúgving ... 18
Indikator 6 Umhvørvi ... 21
Indikator 7 Samfelagsluttøka ... 24
Indikator 8 Heilsa ... 27
Indikator 9 Lívsnøgdsemi ... 30
Indikator 10 Tryggleiki ... 32
Samanhangir ... 35
Keldulisti ... 38

# Hvussu er lívið?

Hetta spyr OECD í kanning síni Better Life, har farið verður afturum vanligu mátingarnar fyri vælferð, og har vanligi borgarin eisini verður eftirspurdur. Í hesi kanning hava vit funnið fram ymisk hagtøl fyri Føroyar samsvarandi OECD kanningini, og vit hava eisini spurt føroyingar, hvussu teir hava tað, og hvussu teirra fatan av gerandisdegnum, heilsuni og framtíðini er. Føroyar eru ikki partur av OECD og eru tískil ikki veruliga ein partur av hesari kanning, men niðanfyri er víst, hvar Føroyar eftir okkara bestu meting høvdu verið um kanningini eisini varð gjørd í Føroyum.

# Um kanningina

OECD (Organisation of Economic Cooperation and Development) er ein samgonga við teimum ríkastu londunum í heiminum. Better Life kanningin hjá OECD íroknar eisini nakrar aðrar búskapir (Russland, Brasilia og Suður Afrika). Tilsamans 38 lond. Henda kanning varð fyrstu ferð framd í mai 2010, tá OECD hevði sín 50 ára føðingardag, har finnast vildi fram til nøkur mynstur og rák fyri tí góða lívinum. Tað góða lívið er sambært OECD annað og meira enn bert búskapur og inntøka. Seinastu ferð kanningin varð framd var í 2015. Væntandi koma nýggj tøl seinni í ár, tá hendan kanning verður uppdaterað.

Better Life kanningin hjá OECD fatar um 11 øki:

1. Býli/Housing
2. Inntøka/Income
3. Arbeiði/Jobs
4. Samfelag/Community
5. Útbúgving/Education
6. Umhvørvi/Environment
7. Samfelagsluttøka/Civic Engagement
8. Heilsa/Health
9. Lívsnøgdsemi/Life Satisfaction
10. Tryggleiki/Safety
11. Javnvág millum arbeiði og frítíð/Work-Life Balance

Hvørt OECD land er skipað eftir stigið fyri hvørt av hesum økjum. Fyri at fáa greiði á hesum 11 økjum (her kallað indikatorar), eru nógvir ymiskir hagtalsupplýsingar savnaðir inn fyri øll londini. Fyri Føroyar ber ikki til at fáa øll hesi hagtøl til vega. Hetta ger so, at ikki ber til heilt víst at meta Føroyar á øllum teimum 11 økjunum omanfyri.

# Háttalag

Umframt hagtøl frá t.d. Hagstovuni verða aðrir upplýsingar nýttir. Serliga úrslit av spurnarkanning kallað Gallup World Poll, sum Fólkaheilsuráðið hevur fingið til vega gjøgnum Gallup Føroyar, har 530 fólk eru spurd. Hetta háttalag er samsvarandi OECD.

Gallup World Poll er ein kanning, sum í flestu londum í heiminum verður gjørd eina ferð um árið, og í ávísum londum sum í Japan, Týsklandi og USA verður gjørd 4 ferðir um árið. Vanliga verða millum 500 og 1000 fólk spurd í hvørjum landi, við fáum undantøkum, har 2000 fólk verða spurd (India og Kina). Kanningin er grundað á vanligt spurnarblað, sum er orðað av leiðandi serfrøðingum á økinum. Gallup World Poll inniheldur nógvar spurningar, men sjálv kjarnan verður spurd í øllum londum. Henda kjarna inniheldur sosioøkonomiskar

spurningar, spurningar um sosialt tilknýti og nøgdsemi við til dømis livistøði. Eisini verða spurningar um subjektivt lívsnøgdsemi spurdir.

Tá hvør indikator verður funnin í Better Life kanningini, skal hann kunna samanberast við tølini fyri hini londini í kanningin. Fyri at tølini skulu kunna samanberast verða øll tølini sett inn á sama hátt. Frymilin fyri at finna hesi virði er hesin:

Frymil 1

$$\textit{Virði} = (\textit{títt tal} - \textit{minimum tal})/(\textit{maksimum tal} - \textit{minimum tal})*10$$

Hetta gevur so eitt tal millum 0 og 10. Er best at vera í lægra endanum, so verður talið drigið frá 10.

Har fleiri parametrar eru fyri at finna tann samlaða felagsindikatorin fyri økið, verður eitt meðaltal funnið fyri hesar. Í mesta lagi eru fýra parametrar fyri hvørt øki, so sum arbeiði. Fyri aðrar er bert ein parametur fyri ein indikator, so sum fyri lívsnøgdsemi.

Hagtøl er fingin til vega ymsa staðni frá. Hesi hagtøl eru til dømis funnin í Manntalskanningini, á heimasíðuni hjá Hagstovu Føroya, Umhvørvisstovuni, ALS og Landslæknanum. Sum fyrr nevnt mangla nøkur hagtøl fyri Føroyar. Eisini fyri onnur lond vænta hagtøl. Tískil er hetta sum so ikki ein trupulleiki fyri kanningina. Kortini, tá tað snýr seg um Arbeiði/frítíð javnvágina hava vit als ongin hagtøl. Hesi hagtøl eru í stóran mun grundaði á Time Use kanningar. Hetta eru fólk, sum hava til uppgávu at skráseta sína tíðarnýtslu. Vit eru ikki vitandi um, at slík hagtøl finnast í Føroyum, og tí verða indikatorar fyri hesi hagtøl als ikki roknaði.

# Høvuðsniðurstøður í frágreiðingini

Seinasta kanning, sum varð framd í 2013, vísti, at Føroyar var millum heimsins bestu lond at liva í. Hesaferð hevur Fólkaheilsuráðið valt at gera ein miðal av øllum indikatorum, og kunnu vit staðfesta, at Føroyar er besta land at liva í, samanborið við ríkastu lond í heiminum um allir indikator eru vigaðir eins. OECD er tó varið við at gera slíka niðurstøðu, tí eftir teirra meting er tað upp til tann einstaka at gera av, hvat fyri indikator ein leggur mest dent. Sum eitt dømi kann nevnast, at Føroyar í miðal eru langt fremst (sí mynd 1), men kortini eru vit í tí lægra endanum, tá tað kemur til útbúgving, so um tú raðfestur útbúgving hægst av hesum indikatorunum, so er kanska betur at búgva í einum øðrum landi. Høvuðsúrslitini fyri Føroyar í 2013 og 2017 eru víst í talvu 1:

| INDIKATOR | OECD BETTER LIFE STIG | | RANGORDAN | |
|---|---|---|---|---|
| | 2013 | **2017** | 2013 | **2017** |
| 1. Býli | 8.1 | **8.5** | 1 | **1** |
| 2. Inntøka | 6 | **5.6** | 15 | **7** |
| 3. Arbeiði | 8.2 | **9.1** | 3 | **3** |
| 4. Sosial Netverk | 9.6 | **8.8** | 6 | **3** |
| 5. Útbúgving | 4.7 | **6.1** | 31 | **28** |
| 6. Umhvørvi | 9.6 | **9.8** | 2 | **2** |
| 7. Samfelagsluttøka | 10 | **9.1** | 1 | **1** |
| 8. Heilsa | 9.2 | **8.9** | 3 | **7** |
| 9. Lívsnøgdsemi | 10 | **10** | 1 | **1** |
| 10. Tryggleiki | 10 | **9,7** | 1 | **1** |
| 11. Arbeiði/frítíð javnvág | Í kanningini er OECD miðal nýtt | | | |

**Talva 1 Samlað yvirlit fyri allar indikatorar fyri Føroyar**

Eins og í seinastu kanning, so liggja Føroyar á einum fyrsta plássi innan 4 øki, sum eru teir somu í ár. Tað er sum fyrr nevnt einans innan útbúgving, har Føroyar als ikki megna at vera við í kappingini. Hini økini vit ikki eru heilt kappingarfør eru innan inntøku og heilsu, har vit eru á 7. plássi.

Innan inntøku eru vit farin langt fram síðani seinastu kanning, nevniliga frá einum 15. plássi. Men innan heilsu eru vit farin aftur til pláss nummar 7 frá einum 3. plássi. Hetta eru áhugaverdar plaseringar, sum nærri verður komið inn á seinni í frágreiðingini.

Niðanfyri í talvu 2 er ein samanbering við okkara grannalond, og har sæst, at hóast hesi ofta verða kosin heimsins eydnsamastu lond, so eru Føroyar í miðal tó rættuliga nógv frammanfyri hini londini. Viðmerkjast skal, at í indikator nr. 11 er OECD miðatalið brúkt fyri Føroyar, so hetta tal er óvist.

Fyri lívsnøgdsemi sæst at Føroyar og Noreg eru bæði á 10, sum er tað hægsta. Hetta er tí at tølini fyri hini londini eru uttan Føroyar og tí skuldi talið fyri Noreg verið lægri um Føroyar eisini var partur av kanningini hjá OECD. Eitt annað tal, har vit í Føroyum veruliga skara framúr er í samfelagsluttøku. Meiri verður komið inn á hetta seinni.

| | Danmark | Noreg | Ísland | Føroyar |
|---|---|---|---|---|
| 1. Býli | 5.7 | 7.5 | 5.3 | 8.5 |
| 2. Inntøka | 4.4 | 4.2 | 4.6 | 5.6 |
| 3. Arbeiði | 8.5 | 9 | 9.7 | 9.1 |
| 4. Sosial netverk | 8.7 | 7.7 | 8.8 | 8.8 |
| 5. Útbúgving | 8.2 | 7.3 | 7.5 | 6.1 |
| 6. Umhvørvi | 8.7 | 10 | 9.7 | 9.8 |
| 7. Samfelagsluttøka | 6.6 | 5.5 | 5.2 | 9.1 |
| 8. Heilsa | 7.8 | 8.5 | 8.6 | 8.9 |
| 9. Lívsnøgdsemi | 9.7 | 10 | 9.6 | 10 |
| 10. Tryggleiki | 9.5 | 9.8 | 8.8 | 9.7 |
| 11. Arbeiði/frítíð | 9.1 | 8.7 | 5.5 | 6.9 |
| **Miðal** | **7.9** | **8.0** | **7.6** | **8.6** |

**Talva 2 Samanbering av Føroyum við hini norðanlondini (tá Føroyar ikki er við í kanningini)**

Samlaða úrslitið fyri øll OECD londini um Føroyar var við er í mynd nr. 1:

Mynd 1 Miðal fyri allar indikatorar




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Í komandi kapitlum verður greitt frá hvørjum indikatori og úrslit Føroya í hesum samanborið við onnur OECD lond.

# Indikator 1 Býli

*Øll hava rætt til hóskandi býli, sigur OECD. Eitt hóskandi býli er meiri enn bert fýra veggir og eitt tak.*

*Okkara hús og heim hava stóran týdning fyri okkara materiella livistøði. Tað er umráðandi, at vit fáa okkara grundleggjandi tørv nøktaðan so sum at vera undir taki, eru fjálg, verða vard móti vindi og regni og kenna okkum trygg innanfyri fýra veggirnar í heiminum. Eisini at vit kenna, at vit hava okkara persónliga rúm. Eitt gott býli hevur stóran týdning fyri okkara heilsu, og fyri menningina hjá okkara børnum. Harafturat er okkara heim týdningarmikið fyri okkara grundleggjandi tørv at hava eina familju.*

*Hesin kapittul greiðir frá býlisumstøðunum gjøgnum nakrar parametrar, har vit hyggja eftir, hvussu nógv pláss vit hava at búgva í, í hvønn mun vit hava atgongd til grundleggjandi saniterar umstøður, hvussu nógv av okkara inntøku fer til húsarhald, og hvussu nøgd vit eru við okkara býli.*

*Í OECD londum eru býlisumstøðurnar sum heild góðar, kortini hava fólk í fleiri av londunum avmarkaða rúmd heima. Eisini hava flestu lond atgongd til grundleggjandi saniterar umstøður, so sum bað og wc. Generelt er galdandi fyri londini, at ein lutfalsliga stórur partur av inntøkuni fer til býli, og at støddin á inntøkuni er við til at avgera, hvussu býlið er.*

*Vánaligar býlisumstøður gera, at bæði kropsliga og sálarliga heilsan verður verri hjá fólki. Eisini kann tað føra til húsaófrið og vánalig úrslit hjá børnum í skúlanum. Grundleggjandi sosialur atburður verður ofta hóttur av vánaligum býlisumstøðum. So sum at aftra seg við at bjóða fólki innar. Eisini vísir gransking, at vánaligar býlisumstøður ávirka luttøkuna í fólkaræðinum og leiðir til lægri støði av sosialum kapitali.*

Samlaði indikatorurin fyri býlið verður roknaður sum miðal av trimum parametrum:

1. Rúm per persón
2. Býliskostnaður
3. Atgongd til grundleggjandi saniter viðurskifti

Fylgjandi tríggjar myndirnar 2-4 vísa úrslitini fyri omanfyri nevndu parametrar, sum saman mynda indikatorin fyri býli:

Mynd 2 – Prosent av húsum uttan vatn




Kelda: Hagstovan, Manntal og OECD Better Life

Mynd 3 – Prosent av inntøku, sum fer til hús




Kelda: Hagstovan, prístalið og OECD Better Life

Mynd 4 – Tal av rúmum per persón




Kelda: Hagstova, manntal og OECD Better Life

Sum sæst á myndunum 2-4 omanfyri, so eru Føroyar væl við í býlisindikatorinum, sum vísir eitt miðaltal fyri býlisumstøðurnar hjá fólkum í OECD londunum.

Á mynd 2 sæst einans svarti prikkurin, og hetta talið er tískil tað sama sum seinasta kanning. Hetta talið er fingið úr Manntalskanningini hjá Hagtovuni.

Reyði bjálkin og lítli svarti prikkurin á mynd 3 vísir prosentvísan part av inntøku, sum vit føroyingar nýta til hús. Her er støðan vorðin nógv betur enn hon var fyri nøkrum árum síðani, og her sæst, at vit brúka minni av okkara inntøku til býli nú enn vit gjørdu í 2013. Hetta ger samlaða indikatorinum gott og fær okkum fram í mun til onnur OECD lond.

Mynd 4 er eisini eitt tal, sum er fingið til vega úr manntalskanningini, har svarti prikkurin er eitt mett tal í 2013, og nýggja talið er tað endaliga. Tískil er hetta tal helst ikki vorðið betur, men nú vita vit, hvat rætta talið er. Og tað plaserar okkum aftur sum nummar 1 í mun til onnur OECD lond.

Á mynd 5 á næstu síðu sæst sostatt endaligi, samlaði indikator fyri býlið.

Mynd 5: Samlaður indikator fyri býlið




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Samlaða úrslitið leggur Føroyar á eitt fyrsta pláss innan býli, eins og í seinastu kanning. Hetta merkir, at í miðal hava føroyingar best býlismumstøður í OECD londunum, kortini ber tó til, at bólkar í føroyska samfelagnum ikki hava góðar býlisumstøður í og við, at hetta er eitt miðal tal.

Indikatorin í mun til seinastu kanning er vorðin betri, og hevur flutt seg frá 8.1 – 8.5 og er hetta serliga grundað á, at føroyingar nýta í miðal lutfalsliga minni av peningi til útreiðslur av býli.

Miðaltalið er roknað út frá hesum parametrum við at nýta frymil 1:

1. Rúm per persón (10)
2. Býliskostnaður (5,4)
3. Atgongd til grundleggjandi saniter viðurskifti (10)

Hetta gevur miðaltalið 8,5 fyri hendan indikatorin, sum er hægst millum øll OECD lond.

# Indikator 2 Inntøkur

*Hóast peningur ikki kann keypa eydnuna, so hevur peningur týdning fyri at fáa eitt hægri livistøði og størri vælveru. Hægri inntøka gevur eisini møguleika fyri betri býli, útbúgving og betri heilsuumstøðum.*

*Inntøka ger, at fólk kunnu nøkta teirra tørvir og fylgja mongum málum, sum hava nakað at siga fyri tey. Ríkidømi ger tað møguligt at viðlíkahalda hesi yvir tíð. Bæði inntøka og ríkidømi geva frælsi at velja livihátt. Kortini kann alt ikki keypast fyri pengar.*

*Inntøka og ríkidømi er vorðið størri seinastu 15 árini fyri flestu fólk í OECD londunum. Men samstundis sæst, at ríkidømi verður ójavnari býtt. Hetta merkir, at tørvur er á at hyggja eftir, um samfelagsbólkar í ov stóran mun verða hektaðir av vælferðini í samfelagnum, og um nýggir hættir at býta virðini eru neyðugir. Norðurlond eru kortini javnari samfeløg, sum tó hava merkt ein størri ójavna seinastu árini.*

Tveir parametrar eru fyri inntøku, har vit einans hava tøl fyri annan av hesum, hesir eru:

1. Inntøka per capita – BTÚ
2. Ognir

Fylgjandi mynd 6 vísir úrslitið fyri omanfyri nevnda parametur nr. 1, sum myndar indikatorin fyri inntøku:

Mynd 6 – BTÚ per íbúgva í PPP dollarum




Kelda: OECD Better Life (hava nýtt donsk tøl fyri Føroyar)

Føroyar hava ikki tøl fyri BTÚ í PPP prísum, tí er her valt at nýta donsk tøl. PPP prísir merkir at samanberiligir prísir skulu nýtast fyri øll lond. Av tí at vit hava sama gjaldoyra sum Danmark kunnu vit nýta teirra tøl við fyrivarni. Tað hevur fyrr verið staðfest (í 2009), at vit hava prísir, sum eru 14% hægri enn í Danmark. Hinvegin eru okkara BTÚ tøl samanberilig við tey donsku, meðan okkara BTI (brutto tjóðar inntøka) er eini 15% hægri, sum er BTÚ íroknað blokkstuðulin frá Danmark og inntøkur hjá føroyingum arbeiðandi uttanlands.

Mynd 7 – Samlaður indikator fyri inntøkur




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Føroyar hava her pláss nr. 7 í heiminum, har vit liggja omanfyri øll okkara grannalond, tá um inntøku ræður, men her skal fyrivarni takast fyri at vit hava ikki tøl fyri ognir, og nýta sostatt eitt miðaltal fyri tann parameturin.

Frá seinastu kanning hava vit flutt okkum frá einum 15. pláss til eitt 7. pláss.

Eisini er javnin í samfelagnum vorðin enn betri, sum verður mátað við gini-indeksinum, sum Føroya Hagstova kunngerð á hvørjum ári. Sostatt kann sigast at Føroyar er eitt tað mest javna landið í heiminum, mátað við hesum hagtali. Við hesi leinkju ber til at síggja gini indeksið fyri Føroyar samanborið við onnur lond http://www.hagstova.fo/fo/talt-og-hagreitt/inntokuuppgerd.

Miðal av hesum indikatori er roknað út frá við at nýta frymil 1: Inntøka per capita – BTÚ (5,6)

# Indikator 3 Arbeiði

*At hava eitt starv, sum hóskar til førleikar og væntanir, og sum gevur eina góða inntøku, er eitt universelt mál fyri fólk runt allan heimin. Búskaparvøksturin fram til fíggjarkreppuna gekk hond í hond við fleiri størv og meiri í løn til flestu folk í OECD londum.*

*Definitiónin fyri "Hóskandi arbeiði" er hendan: "Møguleikar fyri kvinnur og menn at fáa hóskandi og framleiðsluskapandi arbeiði undir umstøðum við frælsi, javnrætti, tryggleika og menniskjansligari virðing" smb. ILO 2003*

*Fólk brúka nógva tíð til arbeiðis, og arbeiði hevur nógv at siga fyri tey. Arbeiðið er ofta tað, sum fólk geva aftur til samfelagið, og hetta gevur teimum virðing og stoltleika. Arbeiðið er tí grundleggjandi fyri tey.*

*Gransking vísir, at arbeiðsloysi hevur eina neiliga ávirkan á kropsliga og sálarliga heilsu og á subjektivt lívsnøgdsemi. Neiliga árinið av arbeiðsloysi er tí nógv breiðari enn bara mista inntøkan.*

Samlaði indikatorurin fyri arbeiði verður roknaður við hesum fýra parametrum:

1. Ótryggleiki á arbeiðsmarknaðinum
2. Arbeiðsprosent
3. Langtíðararbeiðsloysi
4. Lønir

Fylgjandi tríggjar myndirnar 8-10 vísa úrslitini fyri omanfyri nevndu parametrar (vit hava ikki tøl fyri 1. ótryggleika á arbeiðsmarknaðinum), sum saman mynda indikatorin fyri arbeiði:

Mynd 8 – Arbeiðsprosent (prosent av fólki í arbeiði millum 15-64 ár)




Kelda: Hagstovan og OECD Better Life

Mynd 9 – Langtíðararbeiðsloysi (te. arbeiðsleys/ur meira eira enn eitt ár)




Kelda: Arbeiðsloysisskipanin og OECD Better Life

Mynd 10 – Lønir per íbúgva




Kelda: OECD Better Life (hava nýtt donsk tøl fyri Føroyar)

Sum omanfyri í mynd 6, so mangla vit í Føroyum tøl fyri PPP prísir, tí er neyðugt eisini at nýta donsk tøl her.

Mynd 11 – Samlaður indikator fyri arbeiði




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Fýra parametrar eru fyri arbeiði í OECD better life kanningini, og vit í Føroyum hava tøl fyri tríggjar av hesum parametrum. Arbeiðsfjøldina hava vit tøl fyri, eins og vit hava tøl fyri langtíðararbeiðsloysi. Lønirnar eru settar á sama støði sum Danmark.

Sum sæst á mynd 8 eru Føroyar er enn á einum fyrsta plássi tá um arbeiðsfjøld ræður. Eisini er langtíðararbeiðsloysi lágt (mynd 9), og vit standa eisini væl tá umræður lønir (mynd 10).

Samlað eru vit á einum 3. plássi í OECD rankingini fyri indikatorin fyri arbeiði, sum er tað sama sum í seinastu kanning (sí mynd 11).

Í Gallupkanningin sæst harafturat, at 95% av føroyingum eru nøgdir við sítt starv samanborið við 90% í seinastu kanning. Soleiðis kann omanfyri nevnda undirbyggjast við enn størri starvsnøgdsemi.

Samlaði indikatorurin er roknaður út hesum parametrum frá við at nýta frymil 1:

1. Arbeiðsprosent (10)
2. Langtíðararbeiðsloysi (9,3)
3. Lønir (7,9)

Sum gevur eitt miðaltal á 9,1.

# Indikator 4 Sosial netverk

*Vit menniskju eru sosialir skapningar. Títtleikin vit eru saman við øðrum og góðskan av sosiala sambandinum hava nógv at siga fyri okkara vælveru. Fólk njóta at vera saman við øðrum, bæði familju, vinum og starvsfeløgum. Eisini njóta vit aktivitetir meiri, tá vit deila tað við onnur. Harafturat gevur sosiala netverki okkum stuðul, tá vit hava tørv á tí, og hjálpir okkum til dømis í sambandi við starvsmøguleikar og aðrar møguleikar.*

*Afturat tí frøi fólk fáa burtur úr at vera saman við hvørt øðrum, so geva sosial sambond fleiri aðrar ágóðar fyri persónliga og sosiala vælveru. Fólk, sum hava eitt víðkað og stuðlandi netverk hava eina betri heilsu, tey liva ofta longri og tey hava í størri mun eitt arbeiði. Á einum samfelagsligum støði so geva sosial sambond nøkur virði, so sum álit á onnur fólk, sum ávirka nógv annað í samfelagnum, so sum búskaparvøkst, luttøku í demokrati, minni kriminalitet, betri heilsu og størri tollyndi. Indikatorarnir sum verða brúktir í hesum kapittli snúgva seg um, hvussu ofta vit eru saman við familju og vinum, og um vit kenna á okkum, at vit kunnu heita á onkran, um vit eru í neyð.*

*Sum heild eru persónlig, sosial netverk rættuliga sterk í OECD londunum, har flestu fólk síggjast við vinum og familju við jøvnum millumbilum. Eisini siga tey seg oftast hava onkran, tey kunnu heita á, um tey eru í neyð. Kortini eru sjónligir munir millum fólk, ymiskar samfelagsbólkar og demografiskar bólkar. Tey eldru, tey fátøku og tey við lægri útbúgvingum hava eitt lutfalsliga verri sosialt netverk, sigur OECD.*

*Eisini eru stórir munir á áliti millum fólk í ymisku OECD londunum.*

*Hugtakið Sosialur Kapitalur snýr seg um, at sosial sambond – vinarlag, familja og onnur sambond – geva samfelagnum ágóðar, sum nevndir eru omanfyri. Sosialur kapitalur kann tí síggjast sum bæði eitt alment og privat gagn, sum hevur ágóða bæði fyri fólk og samfelag sum heild.*

Hesin samlaði indikator verður einans mátaður upp á spurningin um sosialt netverk, sum varð spurdur í kanningini hjá Fólkaheilsuráðnum umvegis Gallup, Gallup World Poll. Spurt varð í hvønn mun fólk hava onkran, sum tey kunnu heita á, um tey hava tørv fyri tí. Sambært Gallup so hava 96% av føroyingum onkran at heita á, og er hetta talið tað sama sum í undanfarnu kanning.

Mynd 12 niðanfyri vísir, hvar Føroyar liggja í mun til hini londini í OECD. Her sæst, at Føroyar eru farnar uppeftir i rangordanini, soleiðis at vit nú eru á einum 3. plássi heldur enn einum sætta plássi, sum vit vóru seinast.

Gallupkanningin vísir, at 83 % av okkum harafturat eru saman við vinum í minsta lagi eina ferð um vikuna, og at hetta í størri mun er galdandi fyri heilt ung fólk millum 15 og 24 ár.

Mynd 12 – Netverk samlaður indikator




Kelda: Gallup, egnar útrokningar og OECD Better Life

Hetta verður sum sagt bert mátað uppá hendan eina indikatorin, og tá Føroyar eru nr.3 við 96% her fáa vit, við at nýta frymil 1, 8,8 í hesum indikatori (New Zealand hevur 99% og Meksiko 75%). Hetta er á sama støði sum Danmark og Ísland.

# Indikator 5 Útbúgving

*Útbúgving er lykilin til ríkidømi hjá londum og einum betri lívi fyri fólk, sigur OECD. At menna førleikar er týdningarmikið fyri fólk, tí eitt av okkara mest grundleggjandi málum er at læra. Nógvir førleikar eru til, og allir hava týdning fyri at liva tað góða lívið. At megna og skilja heimin letur møguleikar upp fyri fólk og loyvir teimum betri at stýra egnum lívi. Eisini ger útbúgving, at vit betur megna at njóta tað, sum lívið býður okkum. Til dømis eina góða bók ella eina listaframsýning.*

*Óbeinleiðis er útbúgving eisini við til at hækka okkara sosialu vælveru við, at vit við útbúgving fáa t.d. betur størv, betri løn og heilsubetri lívsstíl.*

*Fyri samfelagið merkir betri útbúgving størri produktivitet og búskaparvøkstur. Lægri kriminalitet, meiri nýskapan og politiskan stabilitet.*

*Útbúgving letur hurðar upp fyri fólki og gevur samfelagnum nógvar ágóðar so sum hægri búskaparvøkstur, sterkari sosiala tilvitan og minni av kriminaliteti. Við at gera íløgur í útbúgving kunnu bæði familjur og heil lond røkka nógvum sosialum og búskaparligum málum um somu tíð, sigur OECD.*

*Hesin kapittul nýtir nakrar væl grundaðar indikatorar fyri útbúgving, sum geva eina grundleggjandi mynd av verandi útbúgvingarstøðuni hjá vaksnum íbúgvum og ungum í einum modernaðum samfelagi. Fólk í OECD londum eru vorðin alt betri útbúgvin seinastu mongu árini, og eisini eru londini farin at líkjast hvørt øðrum meiri og meiri í útbúgvingarstøði. Kortini er munurin rættuliga stórur í PISA úrslitinum hjá ymisku londunum.*

*Hóast tað er ókeypis at ganga í skúla í mongum londum, so vísa tøl hjá OECD, at útbúgving og førleikar hjá lesandi enn er nógv ávirkað av inntøku og sosialari bakgrund, og at hetta fylgir fólki yvir tíð. Kanningarnar hjá OECD vísa, at longu fyrstu árini hjá barninum eru avgerandi fyri teirra framtíðar útbúgving og sostatt lív. Tí mælir OECD til, at børn frá illa staddum familjum longu fáa stuðul í skúlagongdini fyrstu árini. Hetta tí tey byrja sítt skúlalív, har tey eru aftanfyri tey meiri væl bjargaðu børnini.*

Fyri útbúgving verða hesir parametrar mátaðir fyri at rokna samlaða indikatorin út:

1. Hvussu stórur prosentpartur av fólkinum hevur eina miðnámsútbúgving?
2. Á hvørjum stigi er landið, tá tað kemur til PISA úrslit?
3. Miðal útbúgvingarár

Vit hava tøl fyri nr. 1 og 2 parametur, men hava ikki tøl fyri parametur nr. 3. Sum sæst á myndunum 13 og 14 á næstu síðu, so standa Føroyar seg ikki serliga væl í hesum báðum parametrum, har vit tó í fyrra parametri við miðnámsútbúgving megna at liggja nærhendis OECD miðaltalinum. Á seinnu myndini, har ræður um PISA úrslit liggja vit sera aftarlaga á 7. aftasta plássi saman við td. londum sum Slovakia, Grikkalandi og Turkalandi, men kunnu tó frøðast um, at úrslitið í ár er nakað væl betri enn tað var í 2013.

Mynd 13 Prosent av fólki við miðnámsskúla ella hægri




Kelda: Hagstova, Manntal og OECD Better Life

Mynd 14 Miðal av seinastu pisa kanning í 2015 (stig í kanning)




Kelda: Mentamálaráðið og OECD Better Life

Mynd 15 Útbúgving samlað




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Hetta er einasti indikatorur, har Føroyar veruliga ikki megna at vera í topp 10 av OECD londunum. Hetta hóast vit samstundis eru millum tey lond, sum lutfalsliga brúka mest pengar uppá útbúgving. Vit hava eina ranking sum nr. 28 land í røðini samanborið við nr. 31 í seinastu kanning.

Kortini vísir Gallupkanningin, at vit føroyingar halda, at okkara børn hava møguleika fyri at læra og mennast hvønn dag, og er hetta talið vaksið frá 90% til 93%.

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum við at nýta frymil 1:

1. Hvussu stórur prosentpartur av fólkinum hevur eina miðnámsútbúgving (7,0)
2. Á hvørjum stigi er landið, tá tað kemur til PISA úrslit? (5,2)

Hetta gevur miðaltalið 6,1.

# Indikator 6 Umhvørvi

*Fólk eru nógv ávirkaði av, hvussu heilsugott fysiska umhvørvið er at liva í. Árinið av dálking, vandamiklum evnum og larmi hava stóra ávirkan á heilsuna.*

*Umhvørvið hevur eisini ávirkan, tí flestu fólk seta prís uppá vakurleika, reinleika og eitt heilsugott umhvørvi, har tey búgva. Fólk hugsa eisini um, at jørðin verður niðurslitin og ovurnýtsluna av tilfeinginum í náttúruni, sigur OECD. At varðveita umhvørvi og náttúrunnar tilfeingi er eisini ein av størstu avbjóðingunum fyri burðardyggari vælveru yvir tíð. At hava atgongd til grøn øki gevur fólki møguleika fyri at njóta at vera saman við øðrum.*

*Hesin kapittul vísir, at í OECD londum er luftin vorðin nakað reinari seinastu árini, hóast fleiri lond enn hava ov stórar mongdir av partiklum. Fólk, sum búgva í stórum ídnaðarlondum, eru ofta í dálkaðari luft samstundis sum tey ikki hava fría atgongd til reint drekkivatn og saniter viðurskifti.*

*Sum heild fyri heimin er tað galdandi, at fysiska umhvørvið er partur av 80% av øllum sjúkum í heiminum. Eisini kundi fjórðingur av allari sjúku, ella 13 milliónir av ov tíðliga deyðum, verið fyribyrgd við at betra um umhvørvið. Umhvørvispolitikkir spæla ein stóran leiklut í globalu heilsuni og tí góða lívinum hjá fólki.*

Indikatorin fyri umhvørvið verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Hvussu fólk eru nøgd við vatngóðskuna, har tey búgva
2. Hvussu rein luftin er, mátað eftir teimum heilt smáu partiklunum í luftini, sum kunnu ávirka heilsuna hjá fólki

Fyrri parameturin verður mátaður við gallupkanningini, har fólk eru spurd um, hvussu nøgd tey eru við vatngóðskuna í Føroyum. Á mynd 16 sæst, at føroyingar eru væl nøgdur við vatngóðskuna og eru vit her á einum 5. plássi fyri hendan parametur, har serliga okkara grannalond eru frammanfyri okkum. Fyri vatngóðsku eru somu tøl vald sum fyri seinastu kanning, sum er eftir Gallup World Poll.

Seinni parameturin verður mátaður av eini mátistøð. Seinni parameturin var ikki gjørligur at samanbera fyri Føroyar í seinastu kanning, men nú hevur Umhvørvisstovan sett mátarar upp, sum máta partiklar í luftini. Umhvørvisstovan hevur 2 ymiskar mátarar, annar í Havnini og hin í Havnardali. Vit hava her nýtt eitt miðaltal fyri mátaran, sum stendur í miðbýnum, eftirsum hetta skal mátast í urbanum umhvørvi. Á mynd 17 sæst, hvussu Føroyar eru viðvíkjandi hesum parametri.

Mynd 16 Prosent nøgd við vatngóðskuna




Kelda: Gallup og OECD Better Life

Mynd 17 Luftdálking mikrogram partiklar pr. kubikk metur í miðbýnum í Tórshavn




Kelda: Umhvørvisstovan og OECD Better Life

Umhvørvisstovan hevur tøl frá 2014 (hini londini hava fyri 2013). Okkara luftgóðska lá hetta árið á 6,4 mikrogram partiklar pr. kubikk metur, men var ein ávís óvissa um hetta tal og er tað minkað síðan til 4,9 í miðal árliga í 2016. Vit hava mett okkara tal til 6 fyri 2013. Noreg hevur eisini eitt tal, sum eitur 6 og td. Suður Korea liggur heilt á 29.

Mynd 18 Umhvørvi samlað:




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Samlað gevur hesin indikator Føroyum eitt 2. pláss millum OECD lond, har einans Noreg er frammanfyri okkum og Ísland er á einum 3. plássi.

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum við at nýta frymil 1:

1. Hvussu fólk eru nøgd við vatngóðskuna, har tey búgva (9,6)
2. Hvussu rein luftin er, mátað eftir teimum heilt smáu partiklunum í luftini, sum kunnu ávirka heilsuna hjá fólki (10)

Í miðal gevur tað talið 9,8 fyri hendan indikatorin.

# Indikator 7 Samfelagsluttøka

*Tað hevur týdning fyri vælveruna hjá fólki at vera við til at velja landsins stjórn og at vera ein partur av politikkinum í samfelagnum. Ein politisk rødd er ein av grundleggjandi frælsinum og rættinum, sum øll hava eina orsøk til at seta prís uppá. Eisini halda fólk, sum hava fingið møguleikan til at siga sína hugsan í eini avgerð, oftari at avgerðin er rættvís. Samfelagsluttøka kann eisini gera, at fólk betur eru før fyri at taka sær av sínum egna lívi. Harafturat ger samfelagsluttøkan, at fólk kenna, at tey hoyra til, tey kenna meiri álit og tey kanna seg sosialt inkluderaði.*

*Samfelagsluttøka gevur fólki eina rødd og loyvi til at vera ein partur av politikkinum í samfelagnum. Í vælvirkandi fólkaræðisligum samfeløgum er samfelagsluttøkan við til at skapa stovnar og stýra lívinum hjá fólkinum.*

*Indikatorarnir, sum eru valdir her, vísa kortini, at hóast øll fólk í OECD londunum hava møguleika fyri at gera sína rødd galdandi, so eru tað langt burtur frá, at øll gera tað. Serliga eru tað tey fátæku, tey minni útbúnu og tey ungu, sum ikki brúka sína rødd.*

*Eisini vísa indikatorarnir, at størri opinleiki og størri gjøgnumskygni als ikki eru við til at økja um áhugan fyri at gera sína rødd galdandi í samfelagnum. Heldur tvørtur ímóti.*

*Færri og færri av OECD borgarunum eru við til at velja landsins leiðslur.*

Tveir parametrar eru fyri samfelagsluttøku, har vit einans hava tøl fyri annan av hesum, hesir eru:

1. Hvussu nógv valdu til seinasta val?
2. Hvussu væl verða hoyringspartar hoyrdir?

Fylgjandi mynd 19 vísir úrslitið fyri omanfyri nevnda parametur um valluttøku, sum myndar indikatorin fyri samfelagsluttøku. Vit hava ikki tøl fyri hin indikatorin fyri Føroyar.

Mynd 19 Valluttøkan við seinasta løgtingsval




Kelda: kvf.fo/val og OECD Better Life

Mynd 19 Samfelagsluttøka samlað




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Vit liggja framvegis á einum fyrsta plássi viðvíkjandi samfelagsluttøku. Vit hava bara tøl fyri valluttøku, tí hin parameturin sum sagt ikki er til taks fyri Føroyar. Tá tann parameturin ikki finst fyri Føroyar verður miðaltalið fyri Føroyar bert valluttøkan.

Valluttøkan í Føroyum er serliga høg. Her liggja vit á einum 4. plássi í OECD, og hevur rákið við lítlari valluttøku ikki rakt Føroyar enn, eins og tað hevur rakt fleiri onnur OECD lond. Hetta vísir, at føroyingar eru sera áhugaðir í samfelagnum og luttaka virkið. Eisini vísir gallupkanningin, at føroyingar hava stórt álit á rættarskipanini, har heili 84% siga seg hava álit, í mun til 80% í seinastu kanning.

Føroyingar hava stórt álit á landsins stýri, nógv størri enn við seinastu kanning, har hesaferð 63% siga seg hava álit á landsins stýri. Tølini við seinastu kanning vóru 46%. Eisini siga føroyingar seg hava stórt álit á valskipanini, sum er 86% í mun til 77% til seinasta val.

Hetta eru sera sunn tøl, sum undirbyggja 1. plássið í OECD rankingini. Í seinastu kanning varð væntað, at Føroyar fóru at fylgja OECD rákinum viðv. hesum parametri, men so er ikki enn.

Miðal av hesum indikatori er roknað við at nýta frymil 1út frá: Miðal valluttøka (9,1).

# Indikator 8 Heilsa

*Lívslongd og fatanin av at liva eitt lív uttan sjúku hava týdning fyri okkum øll. OECD sigur, at okkara heilsustøða er hon, sum hevur allar størsta týdning fyri okkum menniskju saman við tí at hava eitt starv.*

*Nógvir faktorar ávirka okkara heilsu. Okkara ílegur hava týdning. Rúsdrekka og royking. Yvirvekt. Høgt kolesterol. Eisini okkara møguleiki fyri at blíva við at hava eina góða heilsu.*

*WHO defineraði í 1948 heilsu soleiðis: "Heilsa er ein støða við fullkomnari kropsligari og sálarligari vælveru og ikki bara fráveran av eini sjúku". Hetta er heilsa í breiðasti merking, sum ávirkar allar aðrar síður av lívinum og ávirkar okkum øll.*

*At hava eina góða heilsu er eitt tað størsta virðið í lívinum hjá menniskjum. Eisini ávirkar heilsan møguleikan fyri at hava eitt arbeiði, fáa eina útbúgving, lívsnøgdsemi, vinna eina hóskandi inntøku og virkið at luttaka í sosialum virksemi av alskyns slagi. Kortini er tað torført at máta heilsustøðuna hjá fólki, tí hon fatar um so nógv. So sum lívslongd, nærveran av kroniskum sjúkum og bæði kropslig og sálarlig heilsa.*

*Í flestu londum í OECD væntast fólk at liva leingi og siga, at tey hava eina góða heilsu. Kortini hevur ein stórur partur av fólkinum kroniskar sjúkur ella eru avmarkaði í teirra gerandisdegi orsakað av vánaligari heilsu. OECD sigur, at eldri fólk og kvinnur siga teirra heilsustøðu vera ónøktandi og sama við samfelagsbólkum við lægri inntøkum.*

Indikatorin fyri heilsu verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Væntaður livialdur frá føðing í Føroyum fyri bæði kyn samlað
2. Metur tú tína heilsu sum verandi góða?

Mynd 20 og 21 vísa livialdur og sjálvsmetta heilsu.

Mynd 20 Væntaður livialdur




Kelda: Hagstovan og OECD Better Life

Mynd 21 Sjálvmett heilsa




Kelda: Gallup og OECD Better Life

Mynd 22 Samlaður indikator fyri heilsu




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Í mynd 22 sæst at Føroyar eru farnar niður í ranking innan heilsu í mun til hini londini. Vit vóru í seinastu kanning á stig 3 og hesaferð eru vit á stig 7.

Okkara livialdur er á sama støði, men er minkaður eitt vet síðani seinast. Eitt vet hægri prosentstig siga seg hava eina góða heilsu, frá 78% til 82%.

Sostatt hava vit í Føroyum helst ikki fingið eina so nógv verri heilsu enn til seinastu kanning, men vit kunnu taka samanum og siga, at nøkur av hinum londunum hava yvirhálað okkum.

Samstundis kann so eisini takast samanum, at 17% siga seg hava heilsutrupulleikar, sum er ein avbjóðing fyri Føroyar.

Hesin indikatorur er roknaður frá hesum parametrum við at nýta frymil 1:

1. Væntaður livialdur frá føðing í Føroyum fyri bæði kyn samlað (9,3)
2. Sjálvmett heilsa (8,5)

Í miðal gevur tað 8,9 fyri indikatorin heilsa.

# Indikator 9 Lívsnøgdsemi

*Orð sum eydna og vælferð hava leingi verið nýtt sum heitir fyri tað góða lívið. Bert fyri fáum árum síðani var ikki gjørligt at máta vælveruna hjá fólki. Kortini eru tað seinastu árini komin standardiseraði mát fyri hesum, har fólk sjálvi verða spurd, hvussu tey meta teirra lív. Kanningar vísa, at fólk hava lætt við at taka støðu til subjektivt lívsnøgdsemi, og svara skjótari og oftari upp á hendan spurning heldur enn ein meiri objektivar spurningar, so sum teirra inntøku.*

*Kanningar vísa eisini, at subjektivir lívsnøgsemisspurningar verða fataðir eins í ymiskum mentanum. Eisini vísa kanningar, at samanhangur er millum subjektivu vælveruna og í hvønn mun fólk útrykkja jaligar kenslur, so sum smíl.*

*Subjektivt lívsnøgdsemi snýr seg um, hvussu fólk sjálvi uppliva umstøðurnar í teirra lívi. Kapittulin setur sum treyt, at fólk sjálvi eru bestu dómarar fyri, hvussu teirra egna lív gongur.*

*Høvuðsspurningurin í hesum kapitli biður fólk evaluera teirra lív sum eina heild, og spyr eisini inn til nakrar kenslur tey uppliva. Bæði jaligar og neiligar. Sum heild kann sigast, at fyri OECD lond, so er subjektiva lívsnøgdsemi og harvið vælveran millum fólk rættuliga gott.*

*Kortini er tað galdandi fyri nøkur av londunum, at teirra lívsnøgdsemi er líka lágt sum fyri láginntøkubólkar í øðrum londum ella sum fyri fólk í menningarlondum. Meðal lívsnøgdsemi er vaksið við tíðini í fleiri londum og í øðrum londum er tað stagnerað.*

*Upplýsingar til hendan part eru úr Gallup World Poll, sum er ein óalmenn kelda. OECD nýtir hesa keldu, men heldur kortini, at kanningin er grundað á eitt ov lítið datatilfar úr ymisku londunum.*

Hesin indikator verður einans roknaður út út frá spurninginum um lívsnøgsemi:

- Á einum stiga frá 0-10, har 0 er ringasta lívið fyri teg og 10 er best møguliga lívið fyri teg, hvar á stiganum ert tú í dag?

Í mynd 23 sæst hesin parametur fyri indikatorin fyri Føroyar og hini londini:

Mynd 23 Samlaður indikator fyri nøgdsemi




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Her sæst, at føroyingar spreingja skalan fyri lívsnøgdsemi. Vit eru hesaferð eru komin upp um 8 á skalanum, har næsta land í OECD er á 7,6 (Noreg og Sveis). Í seinastu kanning var Føroyar eisini á einum fyrstaplássi við 7,9.

Eisini kann sigast, at føroyingar síggja ljóst uppá framtíðina, tí vit um 5 ár vænta okkum at vera á stig 8,7 í mun til 8,5 við seinastu kanning.

Størst optimisma er at síggja hjá teimum ungu, sum eru omanfyri 9 í stigi um 5 ár, meðan størst lívsnøgdsemi í løtuni er at síggja hjá fólkum millum 40 og 45 ár.

Eisini kann sigast út frá Gallupkanningini, at føroyingar kanska kenna seg minni hvíldar, tá 21% í mun til 15% í seinastu kanning sig, at tey ikki kenna seg hvíldan.

Hetta verður sum sagt bert mátað uppá hendan eina indikatorin, og tá Føroyar eru hægst her fáa vit 10 í hesum indikatori við at nýta frymil 1 (Noreg hevur indikatorin 7,6 og Suður Afrika 4,9).

# Indikator 10 Tryggleiki

*Persónligur tryggleiki er eitt breitt hugtak, sum ma. fevnir um kríggj, etniskar konfliktir, terror, náttúruvanlukkur, umhvørvisvanlukkur og kriminalitet. Nakrar av hesum hendingum henda sera sjáldan og aðrar oftari. Hesin kapittul fevnir einans um kriminalitet, tí kriminalitetur er mest vanligi tryggleikafaktorurin, sum ávirkar flest fólk. Kriminalitetur hevur eisini ávirkan á tey, sum ikki eru offur. Hetta tí, at onnur eisini fáa eina kenslu av ótryggleika, tá ein kriminell hending hevur verið. Tí hevur tað eisini stóran týdning, at fólk sjálvi kenna seg trygg.*

*Persónligur tryggleiki hevur nógv at siga fyri vælveruna hjá fólki. Nógv ymiskt ávirkar tryggleikakensluna, so sum kriminalitetur er mest vanligi indikatorin. Kriminalitetur kann føra til morð, kropsliga pínu, at fáa ognir stolna, postraumatiska strond og angist. At liva í einum tryggum umhvørvi hevur tískil týdning fyri fólk, og harafturat kenslan av ótryggleika avmarkar fólk í gerandisdegnum.*

*Í flestu OECD londum siga fólk, at tey kenna seg trygg, tá tey ganga í teirra grannalagi um kvøldið. Hetta tal er tó lægri fyri teir heilt stóru búskapirnar.*

Indikatorin fyri tryggleika verður mátaður út frá 2 ymiskum parametrum, nevniliga:

1. Hvussu trygt heldur tú tað verða at ferðast úti?
2. Hvussu nógv morð eru hend pr. 100 túsund fólk?

Mynd 24 vísa tøl fyri hvussu trygt fólk í Føroyum halda tað vera at ferðast úti í mun til hini londini. Mynd 25 vísa morðratuna í Føroyum.

Mynd 24 Hvussu trygt heldur tú tað verða at ferðast úti?




Kelda: Gallup og OECD Better Life

Mynd 25 Morðrata pr. 100 túsund




Kelda: Ársfrágreiðing frá Landslæknanum og OECD Better Life

Mynd 26 Samlaður indikator fyri tryggleika




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Tá tað kemur til tryggleika eru vit farin nakað niður eftir í poengum, men eru framvegis á einum 1. plássi.

Tá um morð ræður, so hava vit havt morð síðani seinast (eitt var í 2014), og liggja tí ikki so væl fyri sum seinast í rankingini. Harafturat vóru 96% seinast, sum kendu seg trygg at ganga úti mótvegis 94,3% hesaferð. Og at enda eru tað fleiri, sum kenna seg hava verið úti fyri harðskapi sambært Gallupkanningini.

Sostatt, hóast Føroyar er í toppi fyri tryggastu lond í heiminum, so kunnu vit tó konkludera, at vit ikki kenna okkum eins trygg sum vit gjørdu í 2013.

Hesin indikatorur er roknaður við at nýta hesar parametrar og frymil 1:

1. Hvussu trygt heldur tú tað verða at ferðast úti? (10)
2. Hvussu nógv morð eru hend pr. 100 túsund fólk? (9,3)

Í miðal gevur tað 9,7.

# Samanhangir

Til seinast eru gjørdar nakrar korrelatiónir, sum skulu vísa um tað eru samanhangir millum ymisku indikatorarnar.

Vit hava sett tryggleika upp ímóti nøgdsemi í mynd 27. Er samanhangur millum, hvussu trygt samfelagið er og hvussu lukkulig fólk eru? Tað sæst, at tað er rættiliga góður samanhangur millum hesar parametrar ($R^2$ er eitt tal sum skal vísa hetta og er tað her 0,37, sum er rættiliga høgt í hesum sambandi). Viðmerkjast skal at londini, sum ikki eru í OECD: Russland, Brasilia og Suður Afrika eru ikki við í hesum og komandi grafum.

Mynd 27 Korrelatión millum tryggleika og lívsnøgdsemi




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Næsta korrelatión er millum heilsu og lívsnøgdsemi (mynd 28), her sæst at tað er enn betri korrelatión ella samanhangur millum hesar parametrar. Her er $R^2$ 0,55, sum er heilt gott. Hetta kann týða uppá at góð heilsa er ein góður parametur fyri at siga nakað um lívsnøgdsemi.

Mynd 28 Korrelatión millum heilsu og lívsnøgdsemi




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Til seinast er í mynd 29 eisini roynd ein korrelatión millum nøgdsemi og inntøku. Her er ikki so góður samanhangur, sum kanska sigur nakað um at pengar er ikki alt! Her er $R^2$ einans 0,12, sum má metast at vera lágt.

Mynd 29 Korrelatión millum inntøku og lívsnøgdsemi




Kelda: Egnar útrokningar og OECD Better Life

Restin av $R^2$ samanhangunum við nøgdsemi eru hesir:

| | |
|---|---|
| Netverk | 0,45 |
| Býli | 0,33 |
| Arbeiði | 0,54 |
| Útbúgving | 0,12 |
| Umhvørvi | 0,31 |
| Samfelagsluttøka | 0,21 |

Vit síggja, at indikatorarnir arbeiði, netverk og býli eru tey, sum hava størst samanhang við nøgdsemi, meðan útbúgving ikki hevur tann stóra týdningin.

# Keldulisti

OECD Better Life – www.oecdbetterlifeindex.org
Hagstovan – www.hagstova.fo
Gallup – www.gallup.fo
Arbeiðsloysisskipanin – www.als.fo
Mentamálaráðið – www.mmr.fo
Umhvørvisstovan – www.us.fo
Kringvarp Føroya – www.kvf.fo/val
Landslæknin – www.landslaeknin.fo